# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Gomul vinnumentan á gravarbakka

Útróður var í øldir eitt høvuðsálitið hjá okkara forfedrum. Landið var soleiðis háttað frá skaparans hond, at tað var so at siga ógjørligt at líva mestsum av landbúnaði eina. Sjógvurin var tí eitt álitið, hóast mangan var tikið til, at tað ikki var sum at siga tað at hava hjallin á sjógvinum. Forfedrar okkara lærdu at nýta havið kring oyggjarnar, teir lærdu streym og dugdu at skyna á veðri, hóast teir eingi tól høvdu til taks. Teir vistu, hvussu tað rak á hvørjum tanga, kendu hvørja afturundirgerð og dugdu uttan víðari at meta um, nær ið tað var ráðiligt at leggja frá landi. Hóast hesa dyggu vitan, sum var savnað í øldir, vóru tað mangir av okkara forfedrum, sum ikki bóru boð í bý. Veðri og vindi kann eingin ráða, stundum kemur hann sum úr byrsuni og mangur mátti sanna, at útróður ikki altíð er gamansleikur.

Útróður gjørdist ein hin mest týðandi táttur í okkara vinnumentan. Henda vinnugrein hevur mangan verið hótt ikki minst tey mongu árini, tá ið útlendskir trolarar høvdu loyvi at royna heilt inn á firðir og sund. Tá var mangan svangligt í Føroyum, og tað er tí væl skiljandi, at útróðrarmenn vóru beiskir í huga av hesum útlendska ránsfiskiskapi. Tað er við hesum bakstøði, vit í dag skulu síggja politiska stríðið fyri einum sjómarki, ið kundi tryggja føroyskum veiðimonnum rættin til fiskiríkidømi i egnum sjógvi. Tað gekk sjón fyri søgn: undir báðum heimsbardøgum, tá at kalla eingin fremmandur fiskiskapur var undir Føroyum, vuksu fiskastovnarnir við risaferð.

Vit fingu 200 fjórðinga búskaparmark og so skuldu allar súður verið syftar. Fiskurin innan hetta økið var við lóg lýstur at vera ogn Føroya fólks. Hvussu vit hava umsitið hesa felags ogn, skulu vit ikki umrøða her, tað man fara at verða hovi til tess eina aðru ferð. Hinvegin bendir alt á, at gamla vinnumentanin, útróðurin er komin á fallandi føti. Í blaðnum her í gjár høvdu vit eina frásøgn frá royndum útróðrarmanni, sum avdúkar, at tað als ikki loysir seg at rógva út og at hava útróður sum starv burturav. Hetta er mikið spell, tí fer útróðurin sum yrkislig vinna fyri bakka, so er nógv mist í Føroyum. Vit fáa ikki bert ein reint búskaparligan miss – vit verða eisini fyri einum mentanarligum og siðsøguligum missi. Víst eru royndirnar hjá teimum gomlu festar á blað og finnast enntá í talgildum formi. Men enn eru nógv tær flestu royndirnar at finna hjá teimum mongu, sum hava útróður sum vinnu burturav ella sum lutvísa vinnu. Tann stóra vitan, ið hesir menn hava, eigur ikki at fara fyri skeyti. Teir, ið hava dirvi og áræði at reka útróður sum heilársvinnu ella sum vinnuískoyti eiga at fáa umstøður til tess. Hetta er eitt mál, sum hoyrir heima hjá viðkomandi politisku myndugleikum, ið eiga at taka hetta mál í størsta álvara og finna útvegir til tess at bjarga hesi aldargomlu og siðbundnu vinnugrein, áðrenn ov seint er.

**Sosialurin**

## Ein rættleiðing til fjølmiðlagrein

**JENIS AV RANA**



Atkvøða mín um minking av ríkisstuðlinum, sokallaða blokkinum, verður viðgjørd í grein í fjølmiðlunum. Av tí at mest grundleggjandi fakta í hesari grein er ósatt, loyvi eg mær at endurgeva avrit av atkvøðugreiðsluni, soleiðis sum hon varð skrásett av Løginginum, tann dagin hon fór fram. Atkvøtt varð um niðurskurð í ríkisstuðlinum á 366,4 mió.

Sum sæst var hendan atkvøðugreiðsla h. 15.03.2002, kl. 10.46.45, og av úrskriftini sæst, at løgtingslimur Miðfloksins, Jenis av Rana, atkvøddi nei- og ikki ja, sum greinskrivarin vil verða við.

Nakrar mánaðir áðrenn hesa atkvøðugreiðslu, h. 06. nov. 2001, feldi Løgtingið uppskot mítt um at senda spurningin um lækking av blokkinum út til fólkaatkvøðu. Hugsan mín var at lata føroyska fólkið avgera eina slíka broyting.

Grundhugsan mín um blokkin er annars, at hann er ogn okkara. Og at eingin meining er í, við einvísari minking, at geva einum ríkum landi sum Danmørk pening, sum vit og eftirkomarar okkara eiga. Tá hevði verið skilabetri at sett eina evt. minking í búskapargrunn, til endalig uppgerð við danir vísir veruligu figgjarligu støðuna landanna millum.

ATKVØÐULISTI 15.03.2002
10.46.45

Mál nr: 75.00/2001
Ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "forslag til lov om tilskud til Færøernes hjemmestyre for 2002
Viðgerð nr: 3
sum samtykt við 2. viðgerð

| Tal | Navn | Tast.nr | J | x | N | - | Bu |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8 | Fólkaflokkurin | | | | | | |
| 1 | Rúna Sivertsen ............... | 15 | Ja | | | | |
| 2 | Jógvan við Keldu ............ | 17 | Ja | | | | |
| 3 | Óli Breckmann ............... | 13 | Ja | | | | |
| 4 | Jógvan á Lakjuni ............ | 12 | Ja | | | | |
| 5 | Jóanis Nielsen ............. | 11 | Ja | | | | |
| 6 | Eyðun Viderø ................ | 10 | Ja | | | | |
| 7 | Ingi Olsen .................. | 20 | Ja | | | | |
| 8 | Finnbogi Arge ............... | 14 | | | | | - |
| 6 | Sambandflokkurin | | | | | | |
| 1 | Flemming Mikkelsen .......... | 26 | | | Nei | | |
| 2 | Marjus Dam .................. | 31 | | | Nei | | |
| 3 | Alfred Olsen ................ | 29 | | | Nei | | |
| 4 | Heðin Mortensen ............. | 30 | | | Nei | | |
| 5 | Lisbeth L. Petersen ......... | 28 | | | Nei | | |
| 6 | Edmund Joensen .............. | 27 | | | Nei | | |
| 7 | JAVNAÐARFLOKKURIN | | | | | | |
| 1 | Katrin Dahl Jakobsen ........ | 23 | | | Nei | | |
| 2 | Jóannes Eidesgaard .......... | 24 | | | Nei | | |
| 3 | Henrik Old .................. | 22 | | | Nei | | |
| 4 | Dan R. Petersen ............. | 21 | | | Nei | | |
| 5 | Vilhelm Johannesen .......... | 16 | | | Nei | | |
| 6 | Kristian Magnussen .......... | 18 | | | Nei | | |
| 7 | Hans Pauli Strøm ............ | 19 | | | Nei | | |
| 2 | SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN | | | | | | |
| 1 | Kári P. Højgaard ............ | 2 | Ja | | | | |
| 2 | Helena Dam á Neystabø ........ | 3 | | x | | | |
| 8 | TJÓÐVELDISFLOKKURIN | | | | | | |
| 1 | Signar á Brúnni ............. | 32 | Ja | | | | |
| 2 | Finnbogi Ísakson ............ | 1 | Ja | | | | |
| 3 | Jógvan Durhuus .............. | 4 | Ja | | | | |
| 4 | Heini O. Heinesen ........... | 5 | Ja | | | | |
| 5 | Hergeir Nielsen ............. | 8 | Ja | | | | |
| 6 | Páll á Reynatúgvu ........... | 9 | Ja | | | | |
| 7 | Annita á Fríðriksmørk ....... | 7 | Ja | | | | |
| 8 | Finnur Helmsdal ............. | 6 | Ja | | | | |
| 1 | MIÐFLOKKURIN | | | | | | |
| 1 | Jenis av Rana ............... | 25 | | | Nei | | |
| 32 | Samanlagt ................... | | 16 | 1 | 14 | 0 | 1 |

ORIGINAL NR. 2

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.